HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

FAROESE FOOD and VETERINARY AUTHORITY

Til
John William Joensen
Blaðmaður
Norðlýsið
jwj@nordlysið.fo

Tórshavn, hin 16. desember 2019
Málnr.: 18/00134-16
Tykkara málnr.:

*Einans sent sum t-postur til jwj@nordlysið.fo*

**Viðvíkjandi: Innlitsumbøn um heilivágsnýtlsu hjá føroyskum alibrúkum**

Vísandi til: Umbøn um alment innlit hin 22.01.2018, málnr. 18/00134 - 1, har biðið var um innlit í; *Hvussu stórar nøgdir HFS og heilsumyndugleikarnir í Føroyum hava loyvt føroysku alibrúkum at brúka av evnafrøðiligum evnum á ymisku firðunum og sundum kring landið.*

*Uppískoyti til umsókn um innlit í nýtsluna av heilivági og evnafrøðisligum evnum hjá alivinnuni, ynskja vit at fáa tølini deild á alibrúk og firðir."*

Svar frá 02.02.2018, málnr. 18/001325 - 5, við játtandi svari um innlit um nýtslu av heilivági hjá alivinnuni, men heilivágsnýtslu fyri hvørt aliøki skuldi viðgerast liðugt, tá upplýsingarnar hesum viðvíkjandi vórðu skipaðar.

Umframt rykkjara frá 18.09.2018, málnr. 18/00134 -7, við svari frá 19.09.2018, málnr. 18/00134 -8, um at aliskipanin framvegis ikki var skipað. Og 2. rykkjara frá 24.10.2019, málnr. 18/00134 - 9, stílað til Bárð, har spurt varð: "*Hvussu gongur við at fáa hagtølini við heilivági, sum brúkt verða í alivinnuni út á heimasíðuna, tilskilað alibrúk nøgd, slag av heilivági v.m......?*" Og svari frá 12.11.2019, málnr. 18/00134-12

**Málslýsing**
Sambært § 4, stk. 1 í ll. nr. 133 frá 10. juni um innlit í fyrisitingina (innlitslógin,) kann ein og hvør við teimum undantøkum, sum eru nevnd í § 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.
Innlitisumbønin snýr seg um, hvussu nógvan heilivág hvørt alibrúk sær brúkar. Hesar upplýsingar kunnu verða at rokna sum handilsloynidómar hjá einum alifelagi. § 12, stk. 1, nr. 2, í innlitislógini ásetir m.a. at rætturin til skjalainnlit ikki fevnir um upplýsingar um rakstrar – ella vinnuviðurskifti, um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tað virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti. Upplýsingarnar, um hvussu nógvar nøgdir hvørt aliøki sær brúkar av heilivági, kunnu tí vera fevndar av avmarkingini um innlit í innlitislógini.

Smyrilsvegur 7, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http://www.hfs.fo

Fyri at meta um vandi kann vera fyri einum fíggjarligum missi hjá alifyritøku um innlit verður givið í umbidnu upplýsingar, varð umbønin send til viðmerkingar hjá tí einkulti fyritøkuni, sum tá hevði sent upplýsingar inn til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

**Hoyringssvar**

Í hoyringssvarið frá 18. 11. 2019 verður mælt frá innliti. Hesar viðmerkingar frá alifyritøkuni verða drignar fram:

*Um upplýsingarnar verða givnar, er tað sama sum, at innliti verður givið í upplýsingar um hvussu nógvan og hvønn heilivág hvør einstøk alifyritøka brúkar ella hvørjar viðgerðir verða framdar á hvørjum aliøki.*

*Tað er lætt at útgreina skamtin í hvørjari alieind, og harvið eisini útleiða biomassa í hvørjari alieind.*

*Tað snýr seg um viðkvæmar upplýsingar sum hava sera stóran fíggjarligan týdning fyri alifyritøkuna.*

*Alifyritøkur eru undir almennum eftirliti og framleiðslan er góðkend.*

*Tað er ein handilsligur loynidómur, hvussu nógvan heilivág ein alifyritøka brúkar.*

*Upplýsingarnar kunnu misbrúkast um hesar verða givnar, tí upplýsingarnar bert vísa á hvussu nógvan heilivág ein alifyritøka hevur brúkt á einum firði í einum ávísum tíðarskeiði*

*Upplýsingarnar eiga at verða noktaðar við tilvísing til § 13, stk. 1 nr. 6, tí hetta í avgjørdan mun kann verða til skaða fyri marknaðarstøðuna hjá eini alifyrtøku.*

Um so er ein fyritøka kann grundgeva fyri, hví upplýsingar kunnu fáa ítøkilig skaðilig árin fyri fyritøkuna, hevur haldanarreglan (da: formodningsreglen) við sær, at ikki er neyðugt við fleiri skjalprógvum fyri at myndugleikin kann avmarka innlit. Tað forðar tó ikki myndugleikanum fyri, at gera eina ítøkiliga meting um innlit skal noktast ella avmarkast.

**Lógargrundarlagið**

Tann 13. juli 2017 varð broyting framd í ll. nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur (djórasjúkulógin), við gildiskomu hin 1. oktobur 2017, um at alifyritøkurnar skuldu m.a. boða frá, hvussu nógvan heilivág tær brúka á hvørjum alibrúki sær. Umframt hesa fráboðan skulu hesar upplýsingar almennakunngerast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sbr. § 11, stk. 7-8 í djórasjúkulógini.

Í kunngerð nr. 80 frá 14. juni 2019 um stovnan og sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum (rakstrarkunngerðin), sum hevði gildiskomu hin 19. juni 2019, er útgreinað hvørjar upplýsingar skulu latast inn til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, og sum eisini skulu almannakunngerast.

Í almennu viðmerkingum til broytingaruppskoti í ll. um djórasjúkur verður sagt; "atlit til áhugamál hjá almenninginum í størst møguligan mun at hava atgongd til upplýsingar, sum nevndar eru í § 1 í

uppskotinum, eiga at ganga fram um atlit til áhugamálini hjá alifeløgunum at kunna halda slíkar upplýsingar undan innliti sum handilsloynidómar. Og víðari í serligu viðmerkingum: "Við hesum er eftir uppskotinum tikin støða til í lógini, at atgongd hjá almenninginum kann vera til nevndu upplýsingar, og hesar upplýsingar skulu tí ikki metast sum handilsloynidómar efter § 12, stk. 1, nr. 2 ella § 13, stk. 1, nr. 6 í innilitslógini. "

Endamálið við lógaruppskotinum var sostatt, at geva almenninginum í størst møguligan mun atgongd til upplýsingar um støðuna viðv. fiskasjúkum, nýtsluna av heilivági o.a.

**Viðgerð**

Lógarbroytingin, ið varð framd, avmarkaði hvørjar upplýsingar kunnu metast sum handilsloynidómar sambært § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini. Snýr tað seg um aðrar upplýsingar enn tær sum eru nevndar í djórasjúkulógini § 11, stk. 8, sbr. § 28, stk. 1 í rakstarkunngerðini, skulu hesar framvegis viðgerast eftir innlitislógini, tó í størst møguligan mun sambært § 4, stk. 1, 2. pkt., um meirinnlit í innlitislógini. Sostatt er longu gjørd ein meting, hvørt upplýsingarnar um heilivágsnýtslu kunnu avmarkast sum handilsloynidómur ella ikki, har komið er fram til, at áhugamálið hjá almenninginum til at fáa innlit í nýtsluna av heilivági viga hægri enn áhugamálini hjá alivinnuni av handilsligum áhuga at halda upplýsingunum aftur.

Síðani 1. oktobur 2017 hava lúsatøl verið almennakunngjørd á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Her síggjast lúsatøl og aliøki, herundir tal av fiski á hvørjum alistað.

Hóast spurda alifyritøka sigur, at við at geva innlit verða upplýsingar givnar um heilivágsnýtslu á hvørji einstøku alifyritøku og á hvørjum aliøki, er hetta júst tað sum løggevari vildi við lógarbroytingini í djórasjúklógini.

Talan kann vera um viðkvæmar upplýsingar sambært § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitislógini, men verður hendan avmarkingin í innliti nú sett til viks við upplýsingarskylduni hjá alifyritøkunum í djórasjúkulógini. Við tilvísing til § 13, stk. 1, nr. 6 metir alifyritøkan, at innlit kann skaða marknaðarstøðuna hjá eini alifyritøku. Heildartreytin (da: generalklausul) í § 13, stk. 1, nr. 6, ásetir at skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni, viðvíkjandi privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður er neyðugt at dylja málið. Sera strong krøv eru til at nokta innlit eftir hesi áseting, og skulu krøvini tá verða sera ítøkilig. Serligar umstøður skulu gera seg galdandi, sum ikki verður rokkið við § 12, stk. 1, nr. 2. Tá grundgevingin fyri at dylja upplýsingarnar sbrt. § 13, stk. 1, nr. 6 eru nett tær somu sum í § 12, stk. 1, nr. 2, metir Heilsufrøðiliga starvsstovan, grunda á at allar alfyritøkurnar eru í somu marknaðarstøðu, at heildartreytin ikki kann nýtast í hesum føri.

At talan kann vera um at upplýsingarnar kunnu misbrúkast er heldur ikki ikki nokk í sær sjálvum til at nokta innlit, FOB 2007 315.

EDB skipanin sum skal menna heimasíðuna hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, fyri at kravdu upplýsingarnar kunnu gerast almennar, hevur havt byrjanartrupulleikar, soleiðis at hon ikki kann

F A R O E S E   F O O D   a n d   V E T E R I N A R Y   A U T H O R I T Y

nýtast nøktandi. Sambært danska umboðsmanninum, FOB 2018 5, skal innlit ikki noktast, um myndugleikin hevur móttikið skjøl, sum seinni skulu almannakunngerast, men sum enn ikki eru blivin tað. Sostatt metir Heilsufrøðiliga starvsstovan heldur ikki at innlit kann noktast grunda á, at EDB skipanin ikki riggar sum hon skal. Hetta krevur tó, at myndugleikin hevur móttikið upplýsingarnar sbrt. § 4, stk. 1, 1. pkt.

Niðurstøðan verður tí, at hóast tað í fyrstu syftu, kann tykjast at umbidnu upplýsingarnar eru fevndar av avmarkingunum um handilsloynidómar í § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitislógini og møguliga eisini § 13, stk. ,1 nr. 6, so viga áhugamálini hjá almenninginum, sum viðgjørt omanfyri, í hesum føri hægri. Harafturat verður mett, at sjálvt um telduskipanin ikki er ment til kravda tørvin enn, eiga hesar upplýsingar ikki at avmarkast.

Viðmerkjast skal, at enn eru bert tvær eftirmetingar av heilivágsviðgerð komnar inn í okkara skipan.

**Avgerð**
**Upprunaliga innlitisumbønin frá 22.01.2018 um, hvussu nógvan heilivág hvørt alibrúk og aliøki sær brúka, verður við hesum játtað sbrt. § 4, stk. 1 í innlitslógini.**
**Eftir eini ítøkiligari meting, metir Heilsufrøðiliga starvsstovan ikki at innlit kann noktast ella avmarkast sbrt. § 12, stk. 2, nr. 2 ella § 13, stk. 1, nr. 6, grunda á at áhugamálið hjá almenninginum til at fáa innlit í nýtsluna av heilivági viga hægri enn áhugamálini hjá alivinnuni av handilsligum áhuga at halda upplýsingunum aftur.**

*Umbidnu skjøl liggja sum fylgiskjøl til hetta skriv.*

**Kæra**
Avgerðin kann kærast til Vinnukærunevndina, sbr. § 15, stk. 2 í lóg um alment innlit.

Føroya Kærustovnur
undir Hornabakka
Postboks 45
FO 110 Tórshavn
fks@fks.fo

Vinarliga

Bergljott Øssursdóttir Midjord
Løgfrøðingur

FAROESE FOOD and VETERINARY AUTHORITY



HFS Aliskipan

Spurningar o.a.? Send teldupost til hfs@hfs.fo ella ring á tlf. +298 556400

**Høvuðssíður**
- HFS
- HFS (fjald tøl)
- Heim

**Umsiting**
- Brúkarar
- Leiklutir
- Feilir
- Teknisk umsiting
- Broyt loyniorð
- Grundskráir

**Aling**
- Aliloyvi
- Góðkenn tíðarskeið
- Opna tíðarskeið
- Rakstrardagbók
- Sjúkuskráseting
- Innles xml skjal
- Vegleiðingar o.a.
- Útsetingar

**Lúsateljingar**
- Lúsaportalurin
- Inntøpping
- Lúsateljingar
- Bólking av aliøkjum
- Markvirðir

**Viðgerðir**
- Eftirmetingar

**Uppskurðir**
- Kanningar
- Klinisk tekin

**Eftirmeting**

| | |
|---|---|
| Eftirmetingardato | 02-09-2019 |
| Aliøki | A-06 Argjalandið |
| Viðgerð | Engin viðgerð er skrásett. |
| Eindir | Vís viðgerð fyri eindir... |
| Viðgerð byrjað | 06-08-2019 |
| Viðgerð endað | 15-08-2019 |
| Umfatar viðgerð allar ringar | Ja |
| Virknaður | Dato: 06-08-2019 / 20-08-2019<br>Kynsbúnar laksalýs: 0,52 / 0,50 / -4%<br>Flytiførar laksalýs: 1,61 / 1,03 / -36%<br>Fastar: 0,22 / 0,02 / -90%<br>Kynsbúnar + flytiførar: 2,13 / 1,53 / -28%<br>Seiðalús: 1,72 / 0,13 / -92% |
| Illgruni um ófullfíggjaða viðgerð | Nei |
| Illgruni um mótstøðufori | Nei |
| Ávísing av mótstøðufori | Nei |
| Viðgerð er ok | Ja |
| Lýsing av at viðgerðin er ok | Viðgerð er fyri seiðalús |
| Viðmerking | |
| Stovna | Stovna tann 02-09-2019 21:46:16 av astrombf |
| Góðkenningarstøða | Góðkend tann 03-09-2019 18:50:15 av amm |
| Viðheft skjøl | EmamectinBakkafrFarmWestGulin290719.docx |

Aftur til lista

FAROESE FOOD and VETERINARY AUTHORITY

Tjaldurs Apotek
R.C.Effersøesgøta 31
100 Tórshavn

Kvívík 29.07.2019.

**Rp.** Emamectin-fóður 10 mg/kg, 63.000 kg av 6 mm pellets frá Havsbrún.

**Til:** P/F Bakkafrost Farming West
v/ Regin Jacobsen
Bakkavegur 9
625 Glyvrar

**Aliøki:** A-06, Gulin

**Fiskur:** Laksur
**Tal:** 1.028.000
**Meðalstødd:** 0,855 kg
**Nøgd:** 880.000 kg

**D.S.S.N** Til viðgerð av laksi fyri lús

**Nýtsluleiðbeining:** Gevast skulu hesar nøgdir av heilivágsfóðuri hvønn dag í 9 dagar:

| Eind | Kg/dag | Kg íalt |
|---|---|---|
| 01 | 613 | 5.517 |
| 02 | 670 | 6.030 |
| 03 | 751 | 6.759 |
| 04 | 613 | 5.517 |
| 06 | 1.084 | 9.756 |
| 07 | 800 | 7.200 |
| 08 | 837 | 7.533 |
| 09 | 731 | 6.579 |
| 11 | 901 | 8.109 |

**Afturhaldstíð fyri tøku:** 60 samdøgur aftaná seinasta viðgerðardag !

**Djóralækni:** Andras Strøm
SP/F Fiskaheilsutænastan
Uppi í Trøð 6
340 Kvívík.

FAROESE FOOD and VETERINARY AUTHORITY

## Eftirmeting

| Eftirmeting | |
|---|---|
| Eftirmetingardato | 08-12-2019 |
| Aliøki | A-63 Árnafjørður |
| Viðgerð | Eingin viðgerð er skrásett. |
| Eindir | Vís viðgerð fyri eindir... |
| Viðgerð byrjað | 14-11-2019 |
| Viðgerð endað | 24-11-2019 |
| Umfatar viðgerð allar ringar | Ja |
| Virknaður | see below |
| Illgruni um ófullfíggjaða viðgerð | Ja |
| Lýsing av ófullfíggjaðari viðgerð | Mest fyribyrgjandi fyri fastar lýs og seiðalús |
| Illgruni um mótstøðuføri | Ja |
| Lýsing av illgruna um mótstøðuføri | Virkar mest fyribyrgjandi og fyri seiðalús |
| Ávísing av mótstøðuføri | Nei |
| Viðgerð er ok | Nei |
| Viðmerking | |
| Stovna | Stovna tann 08-12-2019 16:22:56 av astrombf |
| Góðkenningarstøða | Góðkend tann 13-12-2019 13:46:29 av sv |
| Viðheft skjøl | IMG (2).pdf |

Virknaður:

| Dato: | 07-11-2019 | 06-12-2019 | |
|---|---|---|---|
| Kynsbúnar laksalýs: | 0,13 | 0,08 | -40% ▼ |
| Flytiførar laksalýs: | 0,29 | 0,31 | 7% ▲ |
| Fastar: | 0,01 | 0,00 | -100% ▼ |
| Kynsbúnar + flytiførar: | 0,43 | 0,39 | -8% ▼ |
| Seiðalús: | 0,25 | 0,00 | -100% ▼ |

Aftur til lista

FAROESE FOOD and VETERINARY AUTHORITY

Tjalduṛs Apotek
R.C.Effersøesgøta 31
100 Tórshavn

Kvívík 09.11.2019.

**Rp.** Emamectin-fóður 12,5 mg/kg, 120.000 kg av 6 mm frá Havsbrún

**Til:** P/F Bakkafrost Farming North
v/ Regin Jacobsen
Bakkavegur 9
625 Glyvrar

**Alioki:** A-63, Árnafjørður

**Fiskur:** Laksur
**Tal:** 1.212.000
**Meðalstødd:** 1.358 kg
**Nøgd:** 1.646.000 kg

**D.S.S.N** Til viðgerð av laksi fyri lús

**Nýtsluleiðbeining:** Gevast skulu hesar nøgdir av heilivágsfóðuri hvønn dag í 10 dagar:

| Eind | Kg/dag | Kg íalt |
|---|---|---|
| 01 | 615 | 6.150 |
| 02 | 569 | 5.690 |
| 03 | 555 | 5.550 |
| 04 | 491 | 4.910 |
| 06 | 632 | 6.320 |
| 07 | 864 | 8.640 |
| 08 | 505 | 5.050 |
| 09 | 461 | 4.610 |
| 15 | 1.005 | 10.050 |
| 17 | 835 | 8.350 |
| 18 | 1.173 | 11.730 |
| 19 | 1.240 | 12.400 |
| 20 | 1.238 | 12.380 |
| 21 | 778 | 7.780 |
| 22 | 1.039 | 10.390 |

**Djóralækni:** Andras Strøm
SP/F Fiskaheilsutænastan
Uppi í Trøð 6
340 Kvívík.

Fiskaheilsutænastan
Andras Strøm, djóralækni
FR-340 Kvívík

FAROESE FOOD and VETERINARY AUTHORITY

Tjaldurs Apotek
R.C.Effersøesgøta 31
100 Tórshavn

Kvívík 10.11.2019.

**Rp.** Emamectin-fóður 5,0 mg/kg, 500 kg av 2 mm pellets Lumpfish Grower, Biomar.

**Til:** P/F Bakkafrost Farming North
v/ R.Jacobsen
Bakkavegur 9
FO-625 Glyvrar

**Alieki:** A-63, Árnafjørður

**Fiskur:** Rognkelsi
**Tal:** 118.000
**Meðalstødd:** 50 Gr
**Nøgd:** 5.900 kg

**D.S.S.N** Til viðgerð av rognkelsum fyri lús

**Nýtslulciðbeining:** Gevast skal sum matarlysturin er, til fóðuri er uppi.

**Afturhaldstíð fyri tøku:** 60 samdøgur aftaná seinasta viðgerðardag !

**Djóralækni:** Andras Strøm
SP/F Fiskaheilsutænastan
Uppi í Trøð 6
340 Kvívík.

Fiskaheilsutænastan
Andras Strøm, djóralækni
FR-340 Kvívík